e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# KÍ hevur fingið nýggjan høvuðssponsor

*Týsdagin skrivaðu KÍ og Statoil undir sponsoravtalu, og v erður Statoil sostatt aftur høvuðsstuðul hjá Klaksvíkingum*

Jákup Mørk

At eitt meistaraheitið dregur umrøðu og harvið sponsorar til sín, man ikki vera nøkur loyna, og hesum hava Klaksvíkingar enn eina ferð prógvað.

Greipuánararnir hava nevnliga fyri stuttum gjørt sponsoravtalu við Statoil, sum við hesum hevur bundið seg at felagnum komandi tvey árini.

Til stuttleikar kann nevnast, at tá KÍ seinast gjørdist føoyameistari, í 1991, var somuleiðis nýggj avtala skrivað árið eftir, og eisini tað ferðina var tað Statoil, sum gjørdist høvuðsstuðul felagsins.

Umframt at Klaksvíkingar nú hava fingið nýggjan høvuðssponsor, er eisini gjørd avtala um búnararnar, sum KÍ leikararnir skulu leika í komandi árið.

Nýggju búnarnir eru av merkinum, Nike, og er henda avtala gjørd í samráð við All-Inter.



*Hans Waag frá Statoil og KÍ-formaðurin, Svend Jacobsen, taka lógvatak, eftir at nýggja avtalan er undirskrivað. Í miðjuni, John Ryan í nýggja búnanum*

***Mynd: Norðlýsið***

**Væl nøgdir**

Svend Jacobsen, sum er formaður í KÍ, sigur við Sosialin, at teir eru væl nøgdir við nýggju avtaluna.

Hvussu stóra upphædd talan er um, vildi formaðurin ikki upplýsa, men hann segði, at teir vóru væl nøgdir við, at teir á henda hátt høvdu fingið eitt gott ískoyti til raksturin hjá felagnum.

Undanfarna kappingarár hevur tað annars verið Norðoya Sparikassi, sum hevur verið høvuðsstuðul hjá KÍ, og formaður leggur dent á, at nýggja avtalan ikki skal skiljast sum nakar mótvilji móti Sparikassanum.

Tvørtur ímóti sigur hann, at teir framhaldandi hava eitt sera gott samstarv við Norðoya Sparikassa, sum framhaldandi er ungdómssponsor hjá felagnum. Hetta merkir, at Norðoya Sparikassi er stuðul hjá øllum ungdómsliðunum hjá KÍ, og einki er at ivast í, at hetta eisini er nakað, sum leiðsla felagsins er sera fegin um.

# U-18 á venjingarlegu

*Jógvan Martin Olsen, sum er venjari hjá U-18 landsliðnum í fótbólti hevur boðað leikarunum frá, at venjingarlegua verður í Klaksvík 7. og 8. apríl*

Jákup Mørk

Fótbóltsárið er nú av álvara komið í gongd, og ikki er tað bara í feløgunum, at hetta merkist.

FSF hevur nú í fleiri ár verið aktivt við ungdómslandsliðum av ymsum slag, og vikuskiftið 7. og 8. apríl skulu dreingirnar á U-18 landsliðnum á venjingarlegu.

Venjingarlegan verður í Klaksvík, og verður byrjað fríggjadagin kl. 17.15, tá leikararnir hittast á húsarhaldsskúlanum.

Á leguni verður umframt venjing, eisini leiktur ein venjingardystur, og verður hesin móti einum sokallaðum U-23 liðið hjá KÍ.

Venjingarlegan endar leygardagin á døgurða.

**Hópurin**

Fleiri av teimum leikarum, sum eru við í hópinum, hava longu roynt seg í onkrari av fremstu røðunum, og einki er at ivast í, at hetta eigur at koma leikarunum til góðar, tá teir seinni í ár skulu royna seg móti sterkum mótstøðuliðum.

Leikararnir í hópinum eru: Pól Næs Joensen og Niels Joensen úr B36, Jan Ingi Petersen og Kristian Poulsen, B68, Elifinn Ørvarodd úr SÍF, Jack Johannesen úr MB, Arnold Berg av Skála, Áki Hansen, Fróði Jóanessarson, Bergur Djurhuus og Brynjolvur Nielsen úr NSÍ, Bjarni Jørgensen, Vagnur Mortensen og Jón Rói Jacobsen úr HB, Atli Danielsen, Símun Joensen, Kristian á Lakjuni, Hjalgrím Eltør, Kartin Joensen og Rógvi Laksáfoss úr KÍ.

# Hondbóltsgalla fyri yngru deildir

*Leygardagin, 15. apríl, verður hondbóltsgalla fyri dreingir og gentur 10, 12 og 14 ár í Ítróttarhøllini á Hálsi*

Jákup Mørk

Foreldrabólkur hjá Neistanum fyriskipar eitt "Hondbóltsgalla" í Ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin 15. apríl frá kl. 15 til 18.

**Fyrstu ferð**

Aðra staðni er vanligt, at slík gall verða fyriskipað, og eitt nú høvdu eldri deildirnar eitt slíkt kvøld eftir lokna kapping undanfarna kappingarári. Sambært fyriskiparunum hevur hetta tó ikki verið roynt í yngru deildunum fyrr.

Ætlanin við degnum er, at tað skal verða ein hugnadagur har hondbóltsleikarar úr øllum landinum kunnu møtast og hava tað hugnaligt saman við sínum javnlíkum og øðrum, sum av ein ella aðrari orsøk ikki eru aktivir leikarar. Soleiðis at fáa samanhaldið millum leikarar/feløgini enn betur.

Væntandi verður tiltakið einar 3 tímar til longdar, soleiðis at tað er gjørligt hjá øllum at sleppa heim aftur sama dag.

**Fjølbroytt skrá**

Skráin til tiltakið er longu fastløgd, og ikki kann sigast annað enn, at henda er fjølbroytt, við tónleiki, skemti, burturlutingum, umframt at luttakararnir fáa smurt breyð og sodavatn.

Tónleikinum koma orkestrini KRIT, við ungum tónleikarum úr Havn, og TANGZ, sum tey flestu ungu kenna, at taka sær av. Frásøgufólk verður stóra navnið í Føroyum Jóhan í Kollafirði.

Eini 900 innbjóðingarseðlar eru sendir út, og vóna fyrireikararnir, at eini 700 fólk verða at síggja á tiltakinum.

Prísurin á atgongumerkjum er 70,-fyri hvønn, tó 100,- tils. fyri systkin. Atgongumerkið er samstundis lutaseðil har vinningarnir eru: Sjónvarp, Play Station, Fløguspælari, Venjingarbúni og hondbóltar, og so fáa tey eisini smurt breyð og sodavatn.

Stuðla tiltakinum hava: Poul Hansen, heilsøla, Bakaríið hjá Gunnleivi, Vita Margarin, Restorffs Bryggjarí, Radiohandilin í N. Finsensgøtu, Elding í SMS, 3-arin í SMS, Th. Dam Ítróttur og Sport Master í Niels Finsensgøtu, og vilja fyrireikararnir nýta høvið til at takka hesum, fyri at teir hava gjørt tað møguligt at hava kostnaðin á atgongumerkjum á einum somikið lágum støði.

Kemur tiltakið at eydnast væl, soleiðis sum fyrireikararnir vóna, er ikki óhugsandi, at tað fer at verða eitt afturvendandi tiltak.

# Nýggjur dystur

*Superligan: Appel-nevndin hjá DIF staðfesti fyrradagin, at dysturin millum AGF og Esbjerg skal spælast umaftur*

Jákup Mørk

Upprunaligi dysturin millum liðini bæði varð leiktur 6. oktober, og endaði hesin við 2-1 sigri til AGF við Óla Johannesen á liðnum.

Kæran snúi seg um sigursmálið, sum AGF fekk stutt fyri leiklok, tá Íslendski áleyparin hjá AGF, Tómas Ingi Tómasson, metti, at Esbjerg hevði tikið eitt fríspark. Dómarin, Knud Erik Fisker, var samdur við honum og góðkendi málið.

Esbjerg sendi beinanvegin inn kæru, og eftir at henda nú er viðgjørd tríggjar ferðir, er endaliga avgerðin, at nýggjur dystur skal leikast. Hesin er nú ásettur at verða hósdagin, 30. mars.

**Vald dómarans**

Hóast avgerðin nú er endalig, so fer málið helst framhaldandi at føra til orðaskifti í Danmark.

Tað eru nevnliga mong, sum eru ørg inn á avgerina, tí hvussu verður nú í framtíðini? Skal dystur leikast um aftur, tá dómari av órøttum hevur kolldømt eitt mál, ella var talan í hesum førum um heilt óvanliga umstøður?

Seinasta orðið hesum viðvíkjandi er helst ikki sagt enn.



# Liðkappingin í judo endað

*Seinasta umfar av liðkappingini í judo varð á Oyrarbakka sunnudagin, og gjørdist Sunda Jodofelag stóri vinnarin*

Dreingirnir á A-liðnum hjá Sunda Judofelag hava í allan vetur víst seg at havt best tak á kappingini, og hóðast teir ikki hava vunnið allar dystirnar, hava teir alla kappingina havt munin á hinum liðunum.

Tískil var spenningurin ikki heilt í topp áðrenn hetta síðsta umfarið, tí óvanliga illa skuldi gangast í hond, um meistaraheitið skuldi gleppa teimum av hondum.

Og sundadreingirnir vístu seg eisini at liva upp til góðu úrslitini í vetur, og teir vunnu allar sínar dystir í hesum seinasta umfarinum.

Úrslitini av dystunum í dreingjadeildini sunnudagin vóru:

SJFa - SJF b 50-0
HJFa - HJFb 50-0
SJFb - HJFb 30-20
SJFa - HJFa 26-11
SJFa - HJFb 50-0
SJFb - HJFa 20-27

Endaliga úrslitið í dreingjadeildini gjørdist, at Sunda Judofelag a gjørdist føroyameistari við 44 stigum, Havnar Judofelag a gjørdist nr. 2 við 38 stigum og Havnar Judofelag b gjørdist nr. 3 við 16 stigum, Sunda Judofelag b nr. 4 við 12 stigum og Klaksvíkar Judofelag endaði á 5. plássi við 10 stigum.

**Unglingar**

Í unglingadeildini varð eisini stórur spenningur, tí í teimum 4 umførunum, sum høvdu verið fyrr í vetur hevði Sunda Judofelag vunnið tveir dystir og Havnar Judofelag 2.

Sostatt varð greitt, at avgerðin skuldi falla hetta seinasta umfarið.

Og eisini í hesari deildini gjørdist tað Sunda Judofelag, ið fór av stað við gullinum.

Endaliga úrlitið hjá unglingunum gjørdist, at Sunda Judofelag gjørdist føroyameistari við 6 stigum, meðan Havnar Judofelag gjørdist nr. 2 við 4 stigum.

Sosialurin ynskir føroyameistarunum til lukku við heiðursmerkjunum.

Føroyameistarakappingin fyri einstaklingar verður í Havn 8. apríl.

SJ



*Sunda Judofelag a vann dreingjadeildina. Standandi frá vinstru: Rólant Waag Dam, Hjalmar Johannesen, Heðin Bjarkason og Teitur Joensen. Húkandi frá vinstru: Jákup Sumberg, Jógvan Páll Kristiansen og Bjørn Andreasen*



*Sunda Judofelag vann kappingina hjá unglingum: Frá vinstru: Petur Sigurð Johannesen, Terji Joensen, Rólant Waag Dam og Hjalmar Johannesen*

# Tað gekk, sum væntað

*Fótbóltur, UEFA Champions League: Eftir seinastu dystirnar í bólki A og B er tað nú greitt, at Porto og Valencia skulu fylgja Barcelona og Manchester United til fjórðingsfinalurnar*

Jákup Mørk

Seinasta umfarið í øðrum bólkaspælinum í europeisku kappingini fyri meistarar varð avgreitt hetta vikuskiftið. Týskvøldið vórðu bólkarnir A og B avgreiddir, og úrslitini gjørdust á leið soleiðis, sum flestu serfrøðingarnir høvdu roknað við. Í hvussu so er tá tosað verður um, hvørji lið komu víðari.

**Bókur A**
**Barcelona hvíldi seg**

Í bólki A hevði Barcelona longu tryggjað sær fyrsta plássið í bólkinum, og hóast Porto hevði møguleika at tryggja sær framhaldandi luttøku fyri einari viku síðani, so mistu teir sigurin móti Prag í seinastu løtu ta ferðina.

Tískil mátti teir bíða enn eina viku, men hesu ferð var avrikið nóg gott, til at tryggja luttøkuna. Porto vann nevnliga dystin 1-0, við málið, sum Clayton skeyt tá 70 minuttir vóru leiktir av dystinum. Í veruleikanum var luttøkan hjá portugisisku meistarunum ongantíð í vanda, tí teir høvdu bert tørv á einum javnleiki.

Skuldi tað hent seg, at Porto tapti dystin, kundi Sparta Prag tryggjað sær sessin í fjórðingsfinaluni, um teir vunnu heimadystin móti Barcelona. Kekkarnir royndu eisini at vinna dystin, og tað eydnaðist teimum eisiniat koma á odda tíðliga í dystinum, við einum málið sum Svoboda skeyt.

Barcelona, sum má roknast fyri eitt av bestu boðunum upp á ein komandi EC-vinnara, fekk tó aftur tamarhald á dystinum, og við tveimum málum frá Gabri, eydnaðist teimum at vinna dystin. Seinasta málið kom tó ikki fyrr enn í seinasta minuttinum av dystinum, men hetta hevði tó einki at týða fyri Barcelona, sum lat fleiri leikarar fáa eina tiltrongda hvíld henda dystin, so fleiri eykaleikarar fingu nakrar minuttir á vøllinu, og harvið eitt sindur av dystarvenjing.

**Bólkur B**
**Tveir javnleikir**

Kanska var mest óvæntaða úrslitið hetta kvøldið, at Fiorentina bert fekk javnleik á heimavølli móti Bordeaux, men helst var laka úrslitið ávirkað av, at italsku leikararnir longu vistu av, at tað ikki fór at eydnast teimum at koma víðari.

Eingin ivi var tó um, at Fiorentina var nógv betra liðið á vøllinum, og eftir Wiltord heldur óvæntað hevði lagt fronsku meistararnar fram um, gjørdu Chiesa, Batistuta og Rui Costa bart, soleiðis at Fiorentina var á odda 3-1, og bert kundi vóna, at Manchester United fór at skora móti Valencia.

Hetta hendi tó ongantíð, og tá tað gjørdist greitt, at Fiorentina ikki kom víðari, fekk franska liðið tvey bílig mál móti endanum, sum Zanotti og Batlles skutu.

Seinasti dysturin í bólkinum endaði málleysur, og hetta var eisini av flesut serfrøðingum roknað sum mest sannlíka úrslitið, tí tað tryggjaði báðum liðunum víðari luttøku.

Manchester United vildi fyrst og fremst varveita fyrsta plássið í bólkinum, og vildu tí ikki satsa ov nógv frameftir, umframt at teir vóru á útivølli. Valencia kundi røkka fremsta plássinum í bólkinum, men til tess kravdist ein 3-0 sigur, og ístaðin fyri at leypa á, og harvið geva møguleikar fyri kontra-álopum, valdi venjarin, Hector-Cuper, heldur at spæla upp á tryggu loysnina, og sostatt endaði dysturin, sum hann byrjaði. Kanska eitt sindur keðiligt, men liðini hava í dystum sínum víst, at tey vóru bestu liðini í bólkinum.

# FM fyri yngru deildir

*Annað vikuskifti verða FM-heitini hjá yngru flogbóltsdeildunum avgjørd*

Jákup Mørk

Flogbóltskappingin er nú farin at halla, og bæði lands- og steypakappingar eru avgreiddar hjá vaksnu deildunum, tó at hesi enn hava eina kapping á Giljanesi til góðar.

**Yngru deildirnar eru eftir**

Hjá yngru deildunum er árið tó ikki liðugt enn, tí enn væntar flogbóltssambandinum at finna fram til føroyameistararnar í øllum teimum yngru deildunum.

Hesin spurningur verður tó avgreiddur um eina góða viku, tá seinastu kappingarnar hesum viðvíkjandi skulu avgreiðast.

**Kappast í tveimum støðum**

Leygardagin, 1. apríl, verður kappast í Trongisvági, og eru tað aldursbólkarnir; 14 ár, 16 ár og unglingar, sum tá skulu skulu royna seg.

Sunnudagin, 2. apríl, standa so teir báðir yngstu aldursbólkarnir, 9 og 12 ár, fyri skotum, og verða kappingarnar hjá hesum í Gundadalshøllini og í Eysturskúlanum.

Feløgini, sum ætla at senda lið til hesar kappingar, skulu sjálvi boða frá luttøku. Flogbóltssambandið boðar frá, at tilmelding eigur at verða gjørd í kvøld hjá kappingarstjóranum millum kl. 21.00 og 22.00